# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Orðaskiftið um, at eg ikki rindi skatt av mínari pensjón, nívir, og nú flyta vit aftur til Noregs*
*(Gro Harlem Brundtland)*

# Nú stríðist hon fyri sínum politiska lívi

**Eftir fáum døgum hevur Barrack Obama fingið Hillary Clinton aftur og lagt hana langt aftur um seg í New Hampshire, har val verður í morgin**

Í mánaðir hava eygleiðarar verið á einum máli um, at Hillary Clinton fór at vinna uppstillingarvalið í New Hampshire, men nú valdagurin er komin, er vent í holuni. Hillary hevur mist stevið og fótafestið og er dottin niður um avbjóðaran Barrack Obama.

Uppatillingarvalið í New Hampshire verður í morgin, og nú eru allar meiningakanningar samdar um, at Barrack Obama fer at vinna ein greiðan sigur hjá demokratunum. Ein kanning hjá CNN í gjárkvøldið segði, at Obama fær 39 prosent av teimum demokratisku atkvøðunum og Hillary Clinton 29 prosent. Í einari kanning hjá blaðnum USA Today er munurin uppaftur størri. Her fær Obama 41 prosent og Hillary Clinton 28 prosent.

Hjá republikanarunum liggur John McCain á odda í New Hampshire. Kanningarnar siga, at hann fær umleið 32 prosent av teimum republikonsku atkvøðunum, og at Mitt Romney fær 26 prosent. Mike Huckabee, sum vann í Iowa í síðstu viku, fær væntandi umleið 14 prosent í New Hampshire.

### Spennandi

Valevnini gjørdu ta seinastu royndina í New Hampshire í einum stórum orðaskifti í býnum Manchester leygarkvøldið. Tað var týðiligt, at Hillary Clinton var farin í álopsstøðu, og at tað var Barrack Obama, sum stóð fyri skotum hennara. Millum annað legði hon hann undir at hava broytt hugsan á fleiri økjum so sum spurninginum um sjúkratrygging.

- Í veruleikanum kann Obama kjakast við seg sjálvan um tey ymsu málini, segði Hillary Clinton. Barrack Obama svaraði, at hon visti betur, og at hon royndi at snara tí, sum hann hevði sagt.

Hjá republikanarunum var tað serliga Mitt Romney, sum var álopssinnaður. Hann tapti í Iowa, og eygleiðarar siga, at tapir hann eisini í morgin, hevur hann lítlan møguleika at halda fram.

Harafturímóti kann John McCain, senatorur í Arizona, styrkja sína støðu munandi, um hann vinnur í New Hampshire, soleiðis sum kanningarnar benda á. Fyrrverandi borgarstjórin í New York, Rudolph Giuliani, var við í orðaskiftinum í Manchester, men hann spældi aðru fiól.



*Hillary Clinton hevur mist undirtøkuna í New Hampshire og tepir tí helst eisini í morgin*

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at uppstillingarvalini í ár verða kanska so spennandi sum ongantíð fyrr.



*Barrack Obama hevur verið aftan fyri Hillary Clinton, men nú er hann frammanfyri*

# Endiliga kom maturin



*250.000 kenyanar eru flóttafólk í egnum landi, og 500.000 hava tørv á neyðhjálp*

**Tey 15.000 fólkini í Eldoret har vesturi í Kenya vóru fegin um vikuskiftið, tí nú fingu tey endiliga okkurt at eta**

Hóast tey høvdu bíðað leingi eftir matinum, stóðu fólk sinnilig og bíðaðu eftir at fáa tað, sum fall í teirra lut. Teir ungu menninir bóru matvørurnar av lastbilunum, og fólk hjá World Food Program býttu matin út.

Tey 15.000 fólkini í Eldoret eru av Kisii-ættarfólkinum, og síðani nýggjársdag hava tey fjalt seg í einum skúla og nøkrum øðrum bygningum, tí tey noyddust at flýggja undan álopsmonnum úr einum øðrum ættarbólki. Álopsmenninir settu eld á hús teirra og rændu alt, sum teir fingu hendur á.

Talsmenn hjá World Food Program siga, at í landspartinum Rift Valley har vesturi í Kenya eru umleið 100.000 fólk flýdd frá húsi og heimi undan álopsmonnum úr øðrum ættarbólkum. Reyði Krossur sigur, at umleið 250.000 kenyanar eru flóttafólk í egnum landi, og at umleið 500.000 fólk hava tørv á neyðhjálp.

## STUTT SAGT

### Koyrdur úr Iran

Iransku myndugleikarnir góvu um vikuskiftið einum týskum diplomati boð um at fara av landinum sum skjótast, og í gjár váttaði uttanríkisráðið í Berlin, at maðurin var farin úr Iran. Iranska stjórnin sigur, at diplomaturin hevði fingist við virksemi, sum ikki var sambariligt við hansara arbeiði, og at hann tí mátti fara úr Iran. Týskar keldur halda, at avgerðin hjá iransku stjórnini kann hava samband við, at ein iranskur diplomatur bleiv vístur úr Týsklandi seinasta summar.

### Sarkozy giftast

Franska blaðið Journal du Dimanche visti í gjár at siga, at Nicolas Sarkozy, forseti, og unnusta hansara, italska songkvinnan Carla Bruni, skulu giftast tann 8. ella tann 9. februar. Sambært blaðnum hevur Sarkozy givið unnustuni ein trúlovingarring við einum diamanti, og afturfyri skal hon hava givið honum eitt ur frá tí kenda sveisiska urmakaranum Patek Philippe. Nicolas Sarkozy og Carla Bruni hittust fyrstu ferð í novembur í fjør. Forsetin hevur verið giftur tvær ferðir fyrr, og nógvir fransmenn halda lítið um, at hann ætlar at gifta seg aftur. Tað er í hvussu er ein orsøk til, at forsetin hevur mist undirtøku ímillum veljararnar í seinastuni, skrivar NTB.

### Styðja Suleiman

Okkurt bendir á, at tað endiliga fer at bera til at velja nýggjan forseta í Libanon, sum hevur ligið í forsetaloysi síðani tann 23. novembur. Libanska tjóðartingið hevur umrøtt fleiri uppskot, men heilar 11 ferðir er avgerðin útsett. Nú er líkt til, at meiriluti kann fásst fyri herovastanum Michel Suleiman. Á fundi í Kairo um vikuskiftið samdust teir arabisku uttanríkisráðharrarnir um at styðja Michel Suleiman sum forsetaevni. Avgerðin fell tann 12. januar.